

**OYGGJASLAG**

*Fuglfirðingar drógu longra stráið*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# ÍF vann í síðsta minutti

**LØGMANSSTEYPIÐ** Øssur Dalbúð gjørdist stóra hetjan hjá fuglfirðingum, tá hann skoraði sigursmálið í síðsta minutti av longdu leiktíðini, eftir at tað stóð jøvnum 2-2, tá vanliga leiktíðin var farin. Sostatt vann ÍF 3-2 á B68 í einum rótutum, men spennandi dysti

Ólavur Øre

Tað skuldi ganga 120 minuttir áðrenn avgerðin í fjórðingsfinaludystinum millum ÍF og B68 fall. Júst sum flest øll væntaðu at dysturin skuldi avgerðast við brotsspørkum, fekk Øssur Dalbúð eina sending aftur um verjuna hjá B68, og lyfti bóltin hegnisliga upp um Vlada í í tóma B68 málið, til 3-2 til íF.

Sostatt eru tað fuglfirðingar sum drógu longra stráðið í einum jøvnum dysti, og hava harvið ognað sær pláss í hálvfinaluni í kappingini um løgmanssteypið.

### Rótutur dystur

Dysturin millum ÍF og B68 fer ikki í søguna sum ein vælleiktur dystur. Til tað stóð ov nógv uppá spæl hjá báðum liðunum. Høgi intensiteturin, nógvu nærdystirnir og til tíðir harðligt spæl, høvdu við sær at tað ofta var steðgur í dystinum. Av tí sama gjørdist tað trupult at fáa glið á spælið hjá báðum liðum.

Hóast fuglfirðingar høvdu bóltin mest í fyrra hálvleiki, so vóru tað gestirnir sum fingu fyrsta málið, tá Ndende legði gestirnar á odda 0-1, sum eisini gjørdist hálvleiksstøðan.

Tíðliga í seinra hálvleiki bragdaði



**HEVND**

*ÍF fekk hevnd fyri Vodafone-tapið á Toftum*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

hjá fuglfirðingum. Fyrst javnaði Áki Petersen, áðrenn Rógvi Jacobsen legði ÍF á odda, tá tað restaðu 13 minuttir.

Nú vóru tað toftamenn, sum vóru noyddir fram á vøllin fyri at fáa útjavnandi málið, og bert fáar minuttir eftir at íF hevði lagt seg á odda, bleiv ein toftamaður feldur í brotsteiginum hjá ÍF. Dómarin dømdi brotsspark til B68, sum Øssur Hansen setti trygt í netið til 2-2.

### Dramatikkur til síðst

Av tí at dysturin endaði 2-2, var neyðugt við longdari leiktíð. Tað sást á leikarunum, at møðin byrjaði at gera um seg. Markeringarnar sótu ikki líka tættar, og hetta hevði við sær at bæði liðini komu fram til líkinda møguleikar, uttan tó at geva úrtøku.

Serliga dramatiskt bleiv tað fram móti dystarenda. Í 117. Mintti dømir dómarin brotsspark til íF, men eftir at hava ráðført seg við linjudómaran, kolldømdi hann brotssparkið. Í staðin fekk Karl Løkin sítt seinra gula kort, og var harvið vístur av vøllinum.

Tískil skuldu fuglfirðingar leika síðstu minuttirnar við einum manni í undirtali. Men hvat ger tað, tá Øssur Dalbúð avgjørdi dystin í síðsta minutti, til stóra frøi fyri leikarar og viðhaldsfólk hjá ÍF, meðan toftamenn bert kunnu iðra seg um at tapa dystin í síðsta minutti.

hansenolavur@hotmail.com

## Øssur Dalbúð:
## – Ein fantastisk kensla

– Tað er ein fantastisk kensla at skora avgerandi málið í síðsta minutti, segði ein fegin Øssur Dalbúð, tá Sosialurin fekk orðið á hann eftir dystin.

Hóast talan var um ein javnan dyst, so metir Øssur at sigurin hjá ÍF er fult uppiborin.

– Meðan B68 lógu aftarliga á vøllinum og satsaðu uppá mótálop, so royndu vit at mynda dystin, og komu fram til nakrar møguleikar.

– Sjálvt tá B68 leggur seg á odda í fyrra hálvleiki, og tá teir javnaðu seint í dystinum, so blíva vit við at stríðast, og tað lønar seg í síðsta enda, sigur ein fegin Øssur Dalbúð at enda.

hansenolavur@hotmail.com